# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar

13. februar fingu Hanna og Thomas Terndrup, Århus, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3420 gr. Hon eitur Emma.

15. februar fingu Maria á Lakjuni Simonsen og Bjørn Simonsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4010 gr.

16. februar fingu Anja Hansen, Kollafirði, og Frederik Kyllesbeck, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3380 gr.

19. februar fingu Signhild og Tórbjørn Egholm, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3910 gr.

19. februar fingu Beinta Skaalum og Leif Lamhauge, Argjum, eina dóttur. Hon var 58 cm long og vigaði 3300 gr.

20. februar fingu Heiðvík og Ólavur Reinert, Norðradali, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3650 gr.

23. februar fingu Jaret S. Jacobsen og Eivin Gleðisheygg, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4200 gr.

23. februar fingu Judith Falkvard, Sørvági, og Høgni Joensen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4300 gr.

25. februar fingu Maiken á Mýrini og Hans Pauli Petersen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr.

25. februar fingu Súsanna og Niels Martin Olsen, Strendur, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3850 gr.

## 80 ár

29. februar verður Noomi Solmunde, Søldarfjørður, 80 ár.

Dagurin verður hildin í Elim í Søldarfirði frá kl. 17.

## Prógv

Jonna Marion (Joy) Eystberg Johannesen, Skopun hevur 26 feb.04 lokið prógv sum heilsurøktari á Social- og Sundhedsskolen i Thisted.

†

**Helen Hansen**

vanliga nevnd Hella

ættað úr Vági, búsitandi í Værløse
andaðist á Gentofte Sjúkrahúsi
hósdagin 26. februar, 71 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Værløse kirkju
fríggjadagin 5. mars kl. 12.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Hilmer og børnini við familju**

### Minningarorð um

## Elsi Petersen



Sum ein sólarglæma tú kom inn í okkara tilveru. Tú lýsti upp í okkara hjørtum fyri síðani at slókna alt alt ov tíðliga, góða Elsi. Orð eru so fátøk, men kenslurnar so sterkar.

Tú vart tann av okkum trimum, ið altíð visti hvussu og hvat vit skuldu gera og nú í øllum hesum vónloysi vilja vit so gjarna spyrja teg, hvussu gera vit nú?, men góða Elsi vit fáa ongantíð svar, tí hetta er ikki til at skilja.

Tú livdi lívið so fult út, so full av »energi«, spilti ikki eitt sekund, sat ikki og hugsaði um bagatellir, sum vit so ofta gera, tað var lívið for dýrabart til. Men góða Elsi tað síggja vit nú, tær blivu bert unt 26 ár her á fold, tú hevði veruliga onga tíð at spilla. Eitt er sikkurt og vist, at í tínum stutta lívsskeiði spreiddi tú meira gleði og kærleika um teg, enn tey flestu klára upp á eitt langt lív. Tað er ikki torført at finna orð, ið kunnu lýsa teg sum persón góða Elsi. Kærleiki, opinleiki og erligheit eru bert nøkur, sum ímyndaðu teg.

Tað er ikki eitt hálvt ár síðani, at vit stóðu so stoltar og tóku ímóti okkara prógvum, vit høvdu so nógvar planir, tí lívið hevði so nógv at bjóða. Hetta var bara eitt stig á leiðini fyri teg. Tú hugsaði nógv um at fara at arbeiða við børnum, og møguliga nema tær útbúgving sum pedagog, og eisini høvdu vit ein felags dreym um einaferð at arbeiða á somu deild, men so plagdu vit at flenna at, at so bleiv ivaleyst meiri tosað enn arbeitt. Tí eitt er sikkurt, var man saman við tær, ja so fekk man nógvar góðar og stuttligar »diskutiónir«.

Góða Elsi tað er ikki neyðugt her at skriva, hvussu nógv tú hevði at týða fyri okkum, tí tað visti tú væl, tú segði mangan, at tann tíðin, vit høvdu saman bæði her heima og niðri í Odder hevði verið ring at fullføra, um vit ikki høvdu havt hvørja aðra. Og vit minnast eisini væl, hvussu fegin tú var fyri tann stuðul, tú fekk frá tíni familju. Vit fingu jú ofta spurningin, hvussu kunnu tit vera burtur frá barni/børnum so leingi? Og svarið tú altíð gav var, at børnini vóru heima í tryggum hondum hjá familjuni. Og tað hevði helst verið sama svar, tú vildi givið okkum nú.

Áh hvat høvdu vit ikki givið, góða Elsi fyri bert at lánt teg eina løtu afturat, tað er so nógv vit vildu sagt og eisini bara at sæð títt fitta smíl, sum altíð fløvaði okkara hjørtu.

Vit kunnu bara takka fyri ta tíðina, vit høvdu saman við tær. Vit møttust fyri fyrstu ferð fyri 2 1/2 ári síðani, men aftan á stutta tíð føldu vit allar, at vit høvdu kenst altíð. Vit báðar fara ongantíð at gloyma teg, vit tosa um teg alla tíðina, og vit gráta, tá vit tosa um, hvussu nógv vit sakna teg, og vit flenna, tá vit tosa um øll tey góðu minnini, vit hava saman.

Góða elskaða Elsi, tá vit ikki kunnu hava teg ímillum okkum longur, mugu vit royna at læra av tær og liva lívið fult út og vera góð við hvønn annan. Tú fer altíð at standa sum ein varði í okkara hjørtum.

*Hvad er livet?*
*Et pust i sivet*
*Et spild af kræfter*
*der higer efter en evighed*

Góðu tit øll, sum áttu Elsi, má tann lívsglæma, ið lýsti í Elsi koma aftur til tykkara og styrkja tykkum í hesi stóru sorg. Tit hava mist tað dýrabarasta tit áttu, men minnini fara tit ongantíð at missa. Jesuspápi verið hjá tykkum øllum.

Við hesum fáu orðum vilja takka tær, góða Elsi fyri, at vit lærdu teg og tíni at kenna.

**Vivian & Eyð**

## Dagurin

**28. februar. Hildigerð**. Høgt mett týsk abbadissa, sum doyði í 1179. Upprunaliga germanskt navn, samansett av orðum, ið merkja stríð og vernd.

**29. februar**. Kemur fyri tá ið leypár er.

**1. mars. Albinus**, deyður í 550. Abbati og biskupur í Angers í Fraklandi. Varð stutt eftir deyða sín skírdur halgimenni. Navnið merkir *hvítur*.

## Andlát

18. februar
Turid Isholm Andresen, Tórshavn, 70 ár.
19. februar
Evert Petersen í Vági, 79 ár.
20. februar
Svend Hansen, Norðdepil, 78 ár.
21. februar
Mona Joensen, Klaksvík, ættað úr Leirvík, 91 ár.
22. februar
Holgar Poulsen, Klaksvík, 70 ár.
Marjun Tórhalla Reme, Hvidovre, født Weihe ættað úr Tórshavn, 61 ár.
23. februar
Daniel Johannes Bulstad, Sandvík, vanliga nevndur Johannus, 76 ár.
24. februar
Kjartan Nielsen, Vestmanna, 80 ár.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Anna Byrgadóttir:

## Úr Bejing til Boston í Smiðjuni



*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Listaframsýning hjá havnarkvinnuni Onnu Byrgadóttir í Smiðjuni Lítluvík frá 27. februar til 3. mars**

Framsýningin inniheldur náttúralistiskar og abstraktar oljumálningar ið avmynda eina listarliga ferð, sum Anna Byrgadóttir byrjar í Kina í 2002 og endar í USA í 2003. Føroyski parturin av framsýningini er málaður millum ferðirnar.

Kina sæst serliga aftur í sniðum og dekorativum teknum. Og í USA var býurin Boston avmyndaður. Størsti parturin av framsýningini er tó higani úr Føroyum, har hav, landslag og kenslur fylla mest.

Anna Byrgadóttir er 34 ára gomul. Hon hevur nomið sær kunnleika á Listaháskúla á Langeland og í Holbæk. Harumframt hevur hon tikið skeið í modelltekning, foto og grafikki. Hon hevur fyrr sýnt verk fram í Smiðjuni í Lítluvík og á ólavssøkuframsýning.

Framsýningin "Úr Bejing til Boston" kann síggjast hesar tíðir í Smiðjuni í Lítluvík í Havn.

Opið verður soleiðis: Fríggjadagin 27. februar. 16.00 – 18.00, leygardagin 28. februar. 13.00 – 18.00, og frá sunnudegnum 29. februar til 3. mars verður opið frá 14.00 til 18.00.

## Yggdrasil umborð á Høganesi

**Í kvøld, leygarkvøldið, verður aftur skipað fyri konsert umborð á sluppini Høganesi í Runavík. Konsertin verður við ethno-jazzbólkinum Yggdrasil og songkvinnuni Onnu Mariu Olsen.**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Tað er nú nakað síðani tónleikatiltøk vóru umborð á sluppini, og konsertin leygarkvøldið er ætlandi byrjanin á eini longri røð av regluligum tiltøkum; longu í mars eru tvær konsertir á tapetinum, nýggj ljóðútgerð er keypt til tiltøkini og nýtt fólk er eisini komið upp í at skipa fyri.

Bólkurin Yggdrasil við Kristiani Blak sum høvuðskomponisti og fyriskipara byrjaði í 1980 sum norðurlendskur bólkur ella "projekt-manning". Tónleikarar í bólkinum hava verið gitnir norðurlendskir tónleikarar sum Anders Hagberg, Anders Jormin, Tore Brunborg, John Tchicai og aðrir. Fyrsta kompositiónin var til yrkingar eftir William Heinesen í 1981. Verkið kom út á lp-plátu og bar heitið "Den Yderste Ø". Síðani tá hevur Kristian skrivað eini 10 long verk til Yggdrasil. Flestu teirra eru komin út á fløgu.

Sangarar í bólkinum hava eitt nú verið sámisku sangararnir Lennart Kullgren og Ingá Juuso, og Anda Kuitse úr Kulusuk í Eysturgrønlandi, ið øll hava verið týðandi partur av Yggdrasil gjøgnum árini.

Seinastu 3-4 árini hava føroyskir tónleikarar luttikið sum størsti partur av manningini. Í 2001 skrivaði Kristian tilrættisleggingar og upprunalig verk, har føroyskur sangur er ein týðandi partur av tónleikinum. Hesin tónleikur kom út á eini væl móttiknari fløgu í 2002 og sangari var Eivør Pálsdóttir. Sangarar á konsertunum við hesum



tónleiki hava verið Eivør Pálsdóttir og Kári Sverrisson. Tónleikurin hevur vakt áhuga kring Norðurlond, longur suðuri í Europu og í USA, har bólkurin hevur verið á konsertferðum. Nú í januar-februar var Yggdrasil á konsertferð á Hawaii. Bólkurin hevur fingið innbjóðingar at spæla í sjey londum í 2004.

Á konsertini umborð á Høganesi leygarkvøldið hevur Yggdrasil boðið Onnu Mariu Olsen at luttaka sum sangari. Anna Maria syngur í kórinum Mpiri og er annars at hoyra á fløguni "Veðrið eigur orð" við bólkinum LOT, ið kom út fyri jól.

Hinir, ið luttaka á konsertini umborð Høganesi, eru: Ólavur Olsen, trompet - Heðin Ziska Davidsen, gittar - Mikael Blak, bass - Brandur Jacobsen, trummur og Kristian Blak, klaver.

Konsertin leygarkvøldið byrjar klokkan 21.00.

## Takk til Føroya fólk

Takk fyri allan stuðul og hjálp,
tá elskaði maður, pápi, abbi og langabbi okkara

**Gudmundur Gudmundson Isfeldt**

tann 7. januar 2004 fórst í Nólsoyarfirði
og 16. januar afturfunnin í Sumba.

Við hesum takkarskrivi vilja vit vísa øllum takksemi, sum tóku lut í stóru og umfatandi leitingini, ið var sett í verk á sjógvi, landi og í luftini, í samband við lagnudag okkara 7. januar.

**Fyri at vísa á, hvussu umfatandi leitingararbeiði og stuðulin var, vilja vit takka:**

Fyriskiparum og starvsfólkið á MRCC støðini og Færøernes kommando.

Atlantic Airways, Vaktar- og Bjargingartænastuna, Løgregluni, Bjargingarfeløgunum, froskmonnum, ið vit ikki vita nøvnini á, og hjálparfólk tykkara.

Eisini vilja vit takka manningini og hjálparfólki á Golfstream flogfarinum hjá donsku loftverjuni.

Tyrlumanning og hjálparfólki á donsku Lynx tyrluni og bjargingar tyrlunum hjá Atlantic Airways.

Skipara og manningin á Brimli, Spógvanum, danska sjóverjuskipinum Triton og øðrum skipum.

Løgregluni og støðleiðaranum, Jón Klein Olsen fyri menniskjansligan stuðul, tá harðast leikaði á.

Bjargingarfeløgini kring landið, ið skipaðu fyri sera umfatandi leiting fram við sjóvarmálanum.

Tykkum, bátaeigarar ið sjálvbodnir, saman við øðrum, fóru at leita.

Eisini tykkum: vaksin, ung, skúlaflokkar og einstaklingar, ið av sínum eintingum luttóku í leitingini.

Øllum tykkum ónevndu, ið luttóku í sorgleiki okkara, takka vit hjartaliga.

**Fjølmiðlarnar,** herímillum Útvarpi Føroya, sum í tíðindasendingum fleiri ferðir um dagin søgdu frá støðuni og eggjaðu, eisini eftir okkara áheitan, at halda fram at leita.

**Tykkum,** sum funnu lutir av Hellu og í skundi boðaðu frá hesum.

Froskmenn, ið brúktu tímar at greiða okkum frá, hvussu, hvar og hvat, tit fóru at leggja dentin á, tá ið tit fóru at kava.

**Nótavirkið Vón** fyri stuðul og hjálpsemi, tá froskmenn skuldu brúka serstøk amboð og togendar.

**Tykkum,** ið vóru so beinasom at læna okkum bátar og ymiska útgerð í arbeiðinum at leita.

**Skipaeftirlitinum, Færøernes kommando og Mrcc støðini** fyri granskingararbeiði og persónligar frágreiðingar.

**Fiskirannsóknarstovan** fyri sjókagan, ið brúktur varð at finna Hellu.

**Sløkkiliðið,** ið fekk Hellu niðan á brandstøðina og hevði bátin standandi har meðan granskingararbeiði fór fram.

**Serstøk tøkk til sumbingar,** ið settu lívið í váða fyri at bjarga gummibátinum og tí eisini Gudmund og harvið endaðu leitingina. Takk fyri tykkara dirvi og megi, ið hevur bjargað okkum frá einari ólíðiligari óvissu. Við hesum bragdið, góvu tit okkum, hóast alt, næstbesta úrslitið.

Tó at hendingin er óskiljandi, so vita vit í dag, hvar Gudmundur er og óvissan er burtur. Hjartaliga takk fyri tað.

Eisini tit mongu, ið ringdu, komu inn á gólvið í heiminum og á annan hátt vístu samkenslu í vónloysi, kreppu og sorg okkara, takka vit hjartaliga.

Tøkk fái: Herman Eysturoy, Jóan av Reyni, Petur Martin Rasmussen, prestur, Knút Olsen, organistur, sangarar og Paula Hansen, ið hjálpti abbabørnunum við sanginum, sum tey so vakurt sungu til jarðarferðina. Takk til tykkum, ið komu við køkum og tøkk til Erlu við hjálparfólk, ið skipaði so væl fyri ervinum.

Hjartaliga takka vit øllum, ið so vakurt søgdu Gudmundi farvæl, við blómum, kransum og gávum til bjargingarfelagið og tykkum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Vónandi hava vit ikki gloymt nakran, tí vilja vit endurtaka takkarljóðið

**Takk øll somul, takk fyri allan stuðul og samkenslu.**

**Solveig**